# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Skeivi maðurin noyddist út




*Michael Beauchamp stendur púra ovfarin, meðan italski Matteo Trefoloni við reyða kortinum sigur, at dysturin er av fyri hansara viðkomandi*
*Mynd: Polfoto/AP*

**Talan var um klokkuklárt mistak, tá Michael Beauchamp varð rikin av vøllinum á Celtic Park í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Italski Matteo Trefoloni kom í ikki serliga gott ljós, tá hann tíggju minuttir fyri leiklok rak Michael Beauchamp av vøllinum.

Ikki tí, talan var um reytt kort, tá beinin vórðu tikin undan Georgios Samaras. Trupulleikin hjá dómaranum var bara, at tað var Michael Jakobsen, sum framdi brotið á fótbóltsreglurnar. Beauchamp var staddur beint við frísparksstøðuna, og so fór dómarin skeivur, tá reyða kortið varð givið. Og tað gjørdi so ikki til ella frá, at Beauchamp áhaldandi royndi at siga, at hann ikki hevði gjørt nakað sum helst.

- Sjálvandi ætla vit at mótmæla hesum. Tað var jú skeivi maður, sum varð rikin av vøllinum. Og eitt er púra víst. Michael Beauchamp skal ikki hava leikbann fyri nakað, sum hann ikki hevur gjørt. Hvat so hendir við Michael Jakobsen veit eg ikki. Og teir klóku menninir, sum eg havi tosað við um hetta, duga heldur ikki at svara mær, segði ítróttarstjórin í AaB, Lynge Jakobsen, við sporten.dk.

## Úrslit, Champions Legue

| | | |
|---|---|---|
| **Bólkur E** | | |
| | Manchester United-Villarreal | 0-0 |
| | Celtic-AaB | 0-0 |
| **Bólkur F** | | |
| | Steaua Bucharest-Bayern München | 0-1 |
| | Lyon-Fiorentina | 2-2 |
| **Bólkur G** | | |
| | Porto-Fenerbache | 3-1 |
| | Dynamo Kiev-Arsenal | 1-1 |
| **Bólkur H** | | |
| | Real Madrid-BATE Borisov | 2-0 |
| | Juventus-Zenit St. Petersburg | 1-0 |

# Fyrsta danska stigið veruleiki

**Karim Zaza var dagsins maður, men sum heild spældi danska meistaraliðið ein fínan dyst, tá teir í gjárkvøldið fingu javnleik á útivølli móti Celtic**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

FCK og Brøndby hava bæði roynt seg, og tað hevði AaB eisini gjørt á einum sinni áður.

Men javnleikurin í gjárkvøldið á útivølli móti Celtic var fyrsta ferðin, at eitt danskt felag hevur vunnið sær stig á útivølli í bólkaspælinum í Champions League.

Og sum heild var úrslitið so hampuliga rættvíst. Celtic átti heilt greitt størsta møguleikan í dystinum, men Barry Robson megnaði ikki at umseta brotsspark til mál. Eisini hevði Karim Zaza nakrar aðrar framúr bjargingar, men danska liðið beit so sanniliga eisini frá sær. Og talan var um fleiri kontramøguleikar, sum áttu at givið úrtøku, um neyvleikin var bara eitt vet størri.

Men tað endaði málleyst, og tað kundu fyrst og fremst gestirnir vera sera væl nøgdir. Heimaáskoðararnir góvu sína ónøgd til kennar mótvegis Gordon Strachan og hansara monnum. Og fyri Chelsea gjørdist úrslitið ikki betri av, at talan eisini gjørdist um málleysan javnleik á Old Trafford millum Manchester United og Villarreal. Roknað verður við, at tað fyrst og fremst verða Villarreal og Celtic, sum skulu stríðast um at koma víðari saman við favorittunum úr Manchester United.



*Karim Zaza helt eftir dystin, at hesin mátti teljast millum teir tríggjar bestu, sum hann hevur spælt. Her verjir hann fyri roynd frá Samaras*
*Mynd: Polfoto/AP*